LANDSROYND 4. FLOKKUR

mars 2010

# Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir millum skákstrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 4. flokki.)

**Tað er** leygardagur, /**og Hans ger seg kláran/ at fara til** Suðuroyar./ Hann **skal til** svimjikapping/ í Vági./ Hann **gleðir seg nógv/ bæði at sleppa/ at sigla suður/ við** Smyrli,/ **men eisini/ til** sjálva kappingina,/ **tí tað hevur** gingist/ **sera væl hjá honum/ tær** s**einastu** ferðirnar./ **Eisini** Beinta **og Anna/ úr** sama **flokki** sum Hans/ skulu verða **við/ í** kappingini./ Hans **heldur**,/ **at tað er gott/ at hava** onkran/ **at** fylgjast **við**,/ **sum hann** kennir so væl./ Mamma Hans **kemur** við/ til Suðuroyar/ og **eisini** pápi Beintu./ Hans **hevur** pakkað**/** eina **tasku/** í gjárkvøldið,/ so nú er hann **púra klárur/ at fara./** Mamma **ætlar** at hava bilin/ **suður** við,/ tí hon **ætlar** sær/ **ein lítlan túr** til Sumbiar/ at **vitja** pápabeiggja sín,/ um hon **fær tíð** til tess./ **Omma og abbi/ vóru inni** á gólvinum/ í gjárkvøldið,/ og Hans **fekk** 100 krónur/ frá **teimum**./
**-Tað** er alt ov nógv,/ **segði mamma**./ Hans **skal ikki** eta/ so **nógv** góðgæti./
**-Honum** nýtist **ikki/ at keypa** góðgæti/ **fyri allar** pengarnar,/ **segði** omma./
Omma og abbi/ eru líka **spent/** sum Hans og foreldur **hansara**,/ **tá ið** Hans **svimur,/** og tey **hava verið við/** til **fleiri av** kappingunum/ og hugt eftir **honum**.